# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Vunnu á Suðurafrika

**Føroyska talvlandsliðið fór aftur upp um hálvu úrtøkuna, tá tað í gjár eydnaðist at basa Suðurafrika**



*Føroyska liðið, sum í gjár vann á Suður Afrika. Hartil er John Rødgaard eisini á liðnum, men í gjár sat hann yvir*

*Mynd: www.faroechess.com*

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Jóan Hendrik Andreasen hevur í fleiri ár verið millum heilt sterku føroysku telvararnar, men veruliga gjøgnumbrotið hevur hann ikki fingið fyrr enn nú.

Aftur í gjár var hann førur fyri at vinna týðandi stig heim, tá hann á fjórða borði í dysti móti altjóða meistaranum, Mabusela Johanne Mayedi vann sítt talv.

Og tað gjørdist ikki verri av, at Helgi Dam Ziska á fyrsta borði basti Kobese Watu. Tað gav føroyingunum sera sterk kort, og Martin Dam tryggjaði sigurin, tá hann togaði javnleik heim á triðja borði. Á øðrum borði royndi Heini Olsen at fáa javnleik, men hann noyddist at leggja kongin eftir 43 leikir, men tað skalaði kortini ikki føroyska sigurin.

Hetta er fyrsta ferðin, at Føroyar vinna á Suður Afrika í OL-talvi. Áður hevur føroyska landsliðið spælt javnt og tapt móti tjóðini, sum tó var styrkismett nakað lægri enn Føroyar hesaferð. Eisini hóast teir hava tríggjar altjóða meistarar við borðini móti tveimum við føroysku borðini.

# Stjørnan skal reisa seg



*Tapið hjá Stjørnuni seinast hevur lagt eyka trýst á bæði Stjørnuna og Neistan undan dystinum sunnudagin*

**Føroyameistararnir skulu hesa ferð spæla á útivølli móti Neistanum, og so fæst at vita, um niðurtúrurin avmarkaði seg til heimatapið móti VB**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá Stjørnan seinasta sunnudag tapti heimadystin móti VB, var hetta samstundis fyrsta ferðin í hálvttriðja ár, at Stjørnan tapti á heimavølli.

Seinasta heimatapið undan hesum var móti Neistanum, og júst Neistin er mótstøðuliðið, tá Stjørnan sunnudagin skal reisa seg. Hesa ferð á útivølli.

Neistakvinnurnar hava saman við Tjaldri roynt at elt VB og Stjørnuna higar til í kappingini, og hjá teimum er alneyðugt við úrtøku av onkrum slag, um tað ikki skal dragna alt ov nógv millum liðini, longu undan jólasteðginum.

Í Vági er sjálvsálitið hjá heimaliðnum í toppi eftir sigurin í Klaksvík, og tí eigur StÍF als ikki at geva teimum nakrar trupulleikar sunnudagin. Og hóast Kyndilskvinnur kanska fáa eina venjaraeffekt, man tað vera ógvuliga ivasamt, um tær kunnu toga nakað sum helst við sær úr Runavík, har Tjaldur hevur víst seg at vera sera væl fyri í ár.

## Skerdir á bjarnaveiðu

**Í skrivandi løtu er landsliðsúttøkan ikki almannakunngjørd. Men tað er greitt, at tað verður eitt skert føroyskt landslið, sum fer at takast við Russland**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá hesar reglur verða skrivaðar, er ikki greitt, hvørjir manna føroyska landsliðshópin, sum sunnudagin fer til Russlands at takast við eina av tjóðunum, sum nærum pr. definitión verður roknað millum heimsins sterkastu.

Tann bitin er stórur í sjálvum sær, og hann verður ikki minni av, at landsliðsvenjarin hevur valt nakrar av vanliga føstu spælarunum frá hesaferð. Talan er um disciplinera revsing frá eftir at nakrir av spælarunum høvdu verið ein túr í býnum, tá landsliðið spældi í Sarajevo herfyri. Men tá vit hóskvøldið tosaðu við Dia Midjord, vildi hann ikki siga, hvørjar spælarar talan var um. Ikki annað enn, at hetta kom at síggjast á úttøkuni. Og at úttøkan ikki var endaliga greið fyrr enn fríggjamorgunin, tá hann skuldi handa HSF hesa.

Sum skilst er talan tó um tríggjar ella fýra spælarar, sum verða settir heima hesaferð. Sambært 3-2 hjá sjónvarpinum er talan um somikið nógvar spælarar, at revsingin helst má gerast í fleiri umførum.